## Verbeek fer eftir HM

Óansæð, hvussu tað fer at gangast Australia í HM-endaspælinum í summar, skal nýggjur venjari finnast eftir HM. Hollendingurin, Pim Verbeek, sum tók við eftir landsmannin, Dick Advocaat, fyri tveimum árum síðani, hevur boðað frá, at hann ætlar at royna aðrar avbjóðingar. Í 27 dystum við honum sum venjara, hevur Australia bara tapt fýra dystir.



## Eriksson til Afrika

Nógv bendir á, at svenski venjarin, Sven-Göran Eriksson, verður maðurin, sum skal standa á odda fyri Fílabeinsstrondini undir HM-endaspælinum í Suðurafrika. Roknað verður við, at ein avtala verður gjørd við Sven-Göran Eriksson ein av næstu døgunum. Sum skilst, fær hann útivið fýra milliónir krónur fyri sítt arbeiði, spyrst sáttmáli burturúr.

# Pál minni at hugsa um

**– Nýggja OL-loysnin ger tað lættari hjá Páli, tí nú sleppur hann undan at skula hugsa um avleiðingarnar av einum skifti, ið frammanundan merkti, at hann misti eitt heilt ár við kappingum, sigur Jón Bjarnason, venjari hjá Páli Joensen**

einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen




Pál Joensen og Mads Glæsner avmyndaðir í sambandi við 1500 metra finaluna í frísvimjing á donsku meistarastevnuni í Esbjerg fyri einum lítlum ári síðani. Ta ferðina hevði Glæsner munin…
Mynd: Jón Bjarnason

Eins væl og EM og HM, er OL óivað ein av størstu málunum hjá okkara fremsta svimjara, tí 19 ára gamla Páli Joensen, men tað hevur ikki verið so lætt at farið eftir hesum málinum, tí ein stór forðing hevur staðið fyri, sum er karantenan, ið vildi gjørt, at Pál hevði verið noyddur at skrætt eitt heilt ár úr álmanakkanum, skuldi hann skift millum føroyska og danska svimjilandsliðið.

– Nýggja OL-loysnin ger tað lættari hjá Páli, tí nú sleppur hann undan at skula hugsa um avleiðingarnar av einum skifti, ið frammanundan merkti, at hann misti eitt heilt ár við kappingum, sigur Jón Bjarnason, venjari hjá Páli Joensen.

– Nú skal hann bara hugsa um sína egnu svimjing, og tá eitt hálvt ár er eftir til OL, kann hann finna útav, hvat hann vil. Tað snýr seg um at vera nummar eitt ella tvey í danska kongaríkinum, samstundis sum hann sjálvandi skal vera undir kravtíðini til OL. Longu nú er hann undir hesi tíðini, so tað skuldi ikki verið nøkur forðing.

### Má fyrst sleppa við

Skuldi tað hent, at Pál Joensen vildi farið til OL í London sum svimjari fyri Danmark, hevði hann helst verið ein av tveimum – og hin hevði so verið 21 ára gamli danski svimjarin, Mads Glæsner, sum Pál fleiri ferðir hevur kappast ímóti!

– Skal tað henda, so er tað sjálvandi eisini ein spurningur, um danskarar vilja hava Pál við á sítt landslið til eitt OL. Tá hann í síni tíð var við í kappingini um danska meistaraheitið og tók sjey donsk juniormet, vóru tað ið hvussu er ikki øll har niðri, ið vóru líka fegin, sigur Jón Bjarnason.

Við til ta søguna hoyrir eisini, at hesi sjey metini í fyrsta umfarið blivu skrásett sum donsk met, men at trýst frá ymsum síðum gjørdi, at tey síðani eru strikað, so Mads Glæsner framvegis eigur tey gomlu juniormetini. Eingin av donsku svimjarunum, ið ætlaðust at taka metini hjá Glæsner, kláraði tað sum juniorur, og nú eru teir allir seniorar.

# Dyr latnar upp til OL

**Ein nýggj avtala slóðar fyri, at Pál Joensen kann fara til OL í London í 2012 sum partur av danska svimjilandsliðnum, uttan at missa rættin at umboða Føroyar í øðrum altjóða kappingum**

einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen

Hevur Pál Joensen hug og annars svimur undir kravtíðirnar, er einki til hindurs fyri, at hann kann svimja um kapp við aðrar av heimsins bestu svimjarum, tá olympisku leikirnir verða í London í 2012. Og tað kann lata seg gera, uttan at hann skal ofra møguleikan fyri at umboða Føroyar í altjóða kappingum annars, hóast hann noyðist at svimja undir donskum flaggi í OL.

Størsta forðingin hevur annars verið, at svimjarar fáa karantenu í eitt ár báðu megin við eitt skifti, sum vanliga avmarkar teir til bert at kunna umboða eitt land. Henda karantena verður ikki galdandi fyri Pál ella aðrar føroyskar svimjarar, so henda smidliga loysn, ið ÍSF og Svimjisambandið hava kunngjørt, letur upp fyri nýggjum møguleikum.

ÍSF og Svimjisambandið siga, at talan er um eina serskipan, sum fingin er í lag, og at enn er eftir hjá pørtunum at samráðast um, hvussu praktisku viðurskiftini millum Føroyar og Danmark skulu skipast í sambandi við olympiskar leikir.

### Eisini fáa onnur við

Arbeitt hevur verið í eitt ár við at funnið eina loysn, ið loyvir skifti millum føroyska og danska landsliðið í svimjing uttan karantenu, og nógvir partar hava verið uppi í málinum, áðrenn semja fekst um hesa loysnina, sum nú er galdandi.

Umframt ÍSF og Svimjisambandið, hava eisini danska ítróttarsambandið, DIF, danska svimjisambandið, DSU, altjóða olympiska nevndin, IOC, og altjóða svimjisambandið, FINA, verið uppi í málinum.

Ætlanin hjá ÍSF er somuleiðis at víðka skipanina, so hon eisini letur upp fyri, at onnur føroyingar í øðrum ítróttargreinum kunnu kappast í olympiskum høpi, uttan at karantena skal forða fyri tí.

ÍSF sigur, at henda nýggja skipan onga ávirkan fær á skjótt 30 ára drúgva arbeiðið at vinna Føroyum sjálvstøðugan olympiskan limaskap, men at tað arbeiðið heldur fram sum áðrenn.